UTTAN ÚR HEIMI

Sharon hóttir Arafat

Ísraelska stjórnin hevur lovað at hevna ógvusligu bumbuatsóknirnar um vikuskiftið, og stjórnin heldur kreppufund í dag

ÚTLAND
Fartekst

Tær báðar ógvusligu bumbuatsóknirnar leygarkvøldið og sunnumorgunin kostaðu 26 ísraelsmonnum lívið, samstundis sum fleiri hundrað vórðu særd. Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, var á vitjan í Washington, men skundaði sær heimaftur.

Hann hevur boðað stjórnini til kreppufundar í dag at viðgera, hvat gerast skal. Talsmaður hansara segði sunnudagin, at stjórnin fer at hevna tær báðar atsóknirnar.

Ísraelska blaðið Haaretz skrivar í dag, at Sharon skal hava hótt við einum hernaðarligum átaki, summ hevur til endamáls at fáa Yasser Arafat frá sum palestinskan leiðara. Sharon segði sunnudagin, at fleiri av teimum næstu medarbeiðarunum hjá Arafat fara at krevja, at hann skal leggja frá sær.

Sharon skal eisini hava sagt, at í veruleikanum hevur Arafat skipað fleiri drápsmannalið í teimum sjálvsstýrandi palestinsku økjunum.

Bumbuatsóknirnar í Ísrael kostaðu 26 ísraelsmonnum lívið

Mynd: Reuter

Palestinsku myndugleikarnir hava víst ísraelsku skuldsetingunum aftur, og allan gjár royndu palestinskir talsmenn at sissa ísraelsmenn fyri at forða fyri einum ov ógvusligum ísraelskum hevndarálopi.

Fyri fyrstu ferð eru tey palestinsku sjálvsstýrisøkini sett í undantaksstøðu, og myndugleikarnir boðaðu í gjár frá, at teir hava handtikið umleið 75 fólk síðani bumbuatsóknirnar í vikuskiftinum.

Amerikanski forsetin, George W. Bush, hevur hvassliga fordømt tey palestinsku álopini, og Colin Powell, uttanríkisráðharri sigur, at tær blóðigu atsóknirnar eiga at fáa báðar partar at sanna, at tað slepst ikki undan at finna eina friðarliga og varandi loysn á kreppuni.

Betri búskaparútlit næsta ár

Útlitini fyri altjóða búskapinum næsta ár eru betri enn higartil hildið

ÚTLAND
Fartekst

Tað er í hvussu er niðurstøðan hjá týska búskaparstovninum Ifo. Stovnuri hevur kannað útlitini og kunngjørdi úrslitið í gjár.

Sambært Ifo vísir kanning teirra, at fallandi oljuprísur og framhaldandi lág renta verður medvirkandi til vøkstur í búskapinum næsta ár. Stovnurin væntar, at vøksturin fer fyrst at gera vart við seg í USA.

Men lond sum Noreg, Týskland og Russland og flestu londini í Eystur- og Miðevropa fara eisini at fáa gagn av búskaparvøkstrinum.

Týski stovnurin ger vart við, at tann størsti bágin í altjóða búskapinum er tann altsamt minkandi eftirspurningurin hjá tí vanliga brúkaranum.

Nýggjur filmur við Trølla Pætur og Ommuni

Eftir ein steðg í nakrar mánaðar eru trøllini aftur aftur á ferð

TÍÐINDASKRIV

Fyrst í hesu mánaðinum kemur nýggjur filmur út við Trølla Pætur og garrvillu ommuni. Hetta er ein rættur action-fimur, sum hevur alt tað, sum ger ein barnafilm stuttligan og spennandi. Søgugongdin er í stuttum, at meðan Kular Røtur og Trølla Ungin eru á konsertferð í Grønlandi, fara Trølla Pætur og Omman at vitja Nósa. Tey leita í fjørðuni, men finna hann ikki. Tey taka síðani ein speedbát, men verða meldað til løgregluna. Tey fáa at vita, at Nósi er farin til Grønlands aftaná Kulum Rótum. Nú hava trøllini einki at gera, enn at fara til Grøndlands eftir Nósa. Men tað er lættari sagt enn gjørt.

Trøllaomman hevur brotið ímóti lógini og hevur allatíðina løgregluna eftir sær.

Eftir eina spennandi jakt á Havnarvág, fær tann sera væl spælandi politisturin Erling Eysturoy handtikið trøllini. Trølla Pætur og omma hansara, verða sett í fongsul, men tey flýggja, lána tyrluna og mín sann eisini eitt flogfar. Í Grønlandi verður leitað víðari eftir Nósa…

Fimurin sum er 50 min til longdar, er upptikin í summar og í heyst og verður hann í handlinum sum sagt fyrst í desember.

Høvuðsstuðlar eru MBM og Nósin hjá Føroya Banka.

Kolvetnisráð skal halda Føroyum á rættari kós

Arbeitt verður við at seta á stovn eitt kolvetnisráð, sum skal ráðgeva myndugleikum o.ø. í sambandi við komandi oljutilgongdina í Føroyum

OLJUVINNA OG FRAMTÍÐIN
Jan Müller

Føroysku stjórarnir í teimum fýra fyristøðufeløgunum, ið hava leitiloyvi á landgrunninum, Rúni Hansen, Statoil, Ben Arabo, Amerada Hess, Hjarnar Djurhuus, BP og Ingi Højgaard, Agip, eftir væleydnaðu oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum

Mynd Jan Müller

Nú olja er funnin, og vit eru komin nærri eini veruligari oljuvinnumenning í Føroyum, taka alsamt fleiri spurningar seg upp. Fyri at kunna finna røttu svarini til tess at kunna taka tær røttu og skilabestu avgerðirnar er neyðugt við góðum ráðum og leiðbeiningum frá serkønum fólki á ymsum økjum.

Hetta ásannar landsstýrismaðurin í oljumálum, sum á Oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í farnu viku upplýsti, at fyrireikingar nú verða gjørdar til at stovna eitt ráð, sum skal ráðgeva myndugleikum oø. Ráðið fer helst at fáa heitið: “Kolvetnisráðið”.

Tað er alneyðugt at fáa eitt slíkt kolvetnisráð stovnað og til verka sigur landsstýrismaðurin, sum í løtuni er við at leggja seinastu hondina á ætlanina at stovna eitt kolvetnisráð. Hetta fer so at taka upp nøkur av teimum málum, sum gamla Oljuráðleggingarnevndin tók fram í frágreiðingum sínum. Í veruleikanum legði táverandi Oljuráðleggingarnevndin fram eina rúgvu av spurningum, sum vit í dag og í næstu framtíð eiga at taka upp til viðgerðar, spurningar, sum nústaðni nú eru aktuellir at taka upp. Her m.a. spurningin um árinið á samfelagið, á mentanina osfr. Her er spurningurin um avleiðingar av at taka um oljuna uppá land í Føroyum, soleiðis sum tað stendur í lógini. Og mangir aðrir.

Martin Heinesen, jarðfrøðiligi leiðarin av oljuleitingini og Herálvur Joensen, deildarstjóri við broikrúnini hjá Amerada Hess, ið varð brúkt, tá komið varð niður á gass í brunninum. Eitt kolvetnisráð kann koma væl við hjá teimum eisini

Mynd Jan Müller

Ráðgeva myndugleikum

Endamálið við Kolvetnisráðnum verður at vera eitt slag av “sparringspartnara” hjá myndugleikum og øðrum. Tvs at fylgja gongdini, gera kanningar og út frá tí koma við góðum ráðum til myndugleikar og vinnu.

Ráðið skal ráðgeva myndugleikunum í samband við størri oljupolitiskar avgerðir. Møguliga skal tað eisini kunna seta í verk kanningar viðvíkjandi mentunarligum og sosialum árinum av eini oljuvinnu. Hetta er tó ikki greitt enn. Kolvetnisráðið skal hava eina breiða samanseting av persónum, ið umboða

ymisk fakøki. Sosialurin skilur, at avgerð er ikki tikin til, nær ráðið verður sett. Ráðið skal ikki hava nakran myndugleika sum so men meira vera ráðgevandi í øllum sínum virksemi.

Eyðun Elttør sigur, at nærri verður umrøtt um kolvetnisráðið í oljufrágreiðingini, ið verður latin løgtinginum í januar/februar.

Hann heldur annars, at uppskotið, sum formaður Javnaðarfloksins herfyri tók fram í orðaskiftinum um at stovna eina nýggja løgtingsnevnd, ið skal arbeiða burturav við oljumálum við síðuna av Vinnunevndini, vera skilagott, og hann vil fegin stuðla einum slíkum tanka. Eitt Kolvetnisráð vildi tá eisini verið ein góður stuðul hjá eini slíkari løgtingsnevnd.

HYGG HER
Brúktir bilar til sølu
Ford Escort 1,8D 4H
51.000,-
Mercedes Sprinter
130.000,-
Mitsubishi Pajero 2,5 TD 3H
25.000,-
Mitsubishi Galant 2,0 GTI
59.000,-
Ford Fiesta 1,8 Diesel
km. 140.000, árg. okt. 1991
45.000,-
Kia Pride 3H
60.000,-
Kia Sportage 2,0i
95.000,-
Citroen Berlingo 1,9
112.000,-
Nissan Primera 2,0 SLX 4h
115.000,-
Mitsubishi Carisma 1,8 GDI
125.000,-
BMW 318i 4H
205.000,-
Mitsubishi Galant 2,0 GTI 5H
65.000,-
Seat Cordoba D Stcar. 5H
125.000,-
Citroen Xantia 1,9 TD 5H
135.000,-
Fiat Tipo 5H
26.000,-
Mitsubishi Galant 2,0 GLS 4H
165.000,-
Mazda E2200
95.000,-
Vælkomin til!